# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Johan Eli Skålum Lisberg í Hvalba 70 ár

2. desember fyllir Johan Eli 70 ár. Hann er sonur Olantinu Vestantún og Danjal Johan Lisberg úr Smiðjuni í Fámjun.

Johan Eli bleiv faðirleysur 11 ára gamal. Hann vaks upp í ríkum umhvørvi í Skálum. Mamman hevði handil og stórt ognarhús við 2 neytum og nógvum seyði og part í Lítlu Dímun og part í báti.

Alt hetta vaks Johan Eli upp við og bleiv partur av øllum hesum.

Johan Eli fór ungur á háskúla bæði í Føroyum og í Danmark og hevur hann enn mangar vinir frá tí tíðarskeiðinum.



Um 30 ára gamal byrjaði hann at røgva út við Karessu.

Síðani fór keypmaðurin í Skálum rættuliga til sjós. Fyrst við m/s Gudmund og seinnri við m/tr Phoenix, har hann var kokkur líka til í ár, 70 ára gamal.

Meðan Johan Eli hevði við landbrúkið at gera, var hann formaður eitt langt tíðarskeið í Dímun og var sera skilagóður og avhildin formaður.

Johan Eli er giftur við Margit f. Midjord og eiga tey 4 dreingir og so didduna, Kristionnu.

Johan Eli bygdi hús vesturi á Ólavsbarekku. Tá børnini vóru vaksin, fluttu Margit og Johan Eli aftur út í Skálar og fluttu inn Vestantún, har hann hevði havt nógvar góðar løtur saman við mostrunum, Kristinu og Kathrinu.

Síðani Johan Eli bleiv pensionistur hava hjúnini Vestantún verið hvørt summar pensionistaferð. Tey hava verið í Íslandi, í Týsklandi og í Svøríki. Hann dugir sær væl at umstilla seg til pensionistatilverðuna.

Vit ynskja tær hjartaliga tillukku og nógv góð ár við Harrans signing.

**Vinir**

## Andlát og jarðarferðir

**Jákup Augustinussen**, ættaður úr Vági, búsitandi í Hoyvík, andaðist mikudagin 29. novembere, 54 ára gamal.

**Jóhannes Jacobsen**, vanliga nevndur Hanni, Kollafirði, andaðist á Landsjúkrahúsinum mikudagin 29. novembere, 80 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Landssjúkrahúskapellinum sunnudagin 3. desember kl. 13 í kirkjugarðin í Kollafirði.

Kistan við P**ólu Fridu Heilman**, Tvøroyri, fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 17 í Salem. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Pólu, kunnu lata Salem á Tvøroyri eina pengingagávu; konta í pengastovninum.

Kitty May Ellefsen:

## Nýggjur býlingastjóri í SMS

Mánadagin 4. desember byrjar Kitty May Ellefsen sum býlingastjóri í SMS í Havn. Kitty May er 38 ára gomul, fødd í Miðvági og býr Havn.

Hon hevur lisið vinnuløgfrøði ella cand merc (jur) á Handilsskúlanum í Keypmannahavn. Ein útbúgving sum er samansett av vinnulívsrætti og vinnubúskapi. Í sambandi við útbúgvingina búði hon 6 ár í Keypmannahavn.

Eisini hevur hon lisið eitt ár í Aberdeen, har hon tók Master of Law útbúgving í altjóða vinnulívsrætti, umframt at hon hevur lisið leiðslu á Robert Gordon í Aberdeen.

Hon hevur undirvíst á Fiskivinnuskúlanum í marknaðarføring og í roknskaparlæru, altjóða búskapi og vinnulívsrætti á Handilsskúlanum í Havn.



*Mánadagin 4. desember byrjar Kitty May Ellefsen sum býlingastjóri í SMS*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Til 1. desember hevur hon starvast á Menningardeildini í Vinnumálaráðnum.

Ábyrgdarøkið í Vinnumálaráðnum hevur verið samanlegging av Menningarstovuni og Ferðaráðnum og vinnulóggávan, sum arbeitt verður við at dagføra.

Hon hevur verið forkvinna í arbeiðsbólkinum, sum landsstýrismaðurin hevur sett at einskilja P/F Atlantsflog og P/F Føroya Lívstrygging og forkvinna í strategibólkinum 2015 um íverksetan.

Kitty May Gift við Óla M. Hansen stjóra í P/F Fjarðahús. Børnini eru fýra í tali:

Emmy 15 ár, Ronja 10 ár, Jana 8 ár og Jens Eli 2 ár.

## Dagurin

**2. november. Bibiana**, deyð umleið ár 1367. Dóttir ein keisarligan embætismann, Flavianus. Tá ið tað upp, at dótturin var kristin, vórðu øll í húsinum tikin av døgum. Bibiana stendur summastaðni skrivað Viviana.

**3. desember. Sveinur.** Teir vita einki um halgimenni við hesum navni. Norrønt navn ið merkir *ungur maður.*

**4. desember. Barbara**, deyð umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at tann vakra gentan varð vorðin kristin, og heidni faðir hennara stongdi hana inni í einum torni. Hon vildi ikki ganga frá trúnni, og at enda læt faðirin sjálvur hana hálshøgga. Navnið er grikst og merkir *fremmand.*

## Tøkk

Øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæra móðir, vermóðir, omma og langomma

**Sigrid Poulsen**

Saltangará

andaðist á Landssjúkrahúsinum, eftir stutta sjúkralegu, takka vit hjartaliga. Tøkk til starvsfólkini á B8, at tit passaðu hana so væl. Somuleiðis ein stór tøkk til heimahjálpirnar. Tøkk til prest, kirkjutænarar og sangarar. Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Hans, Petur, Leivur og Manbjørn við familju**

## *Tøkk*



Hjartalig takka vit øllum tykkum, sum gjørdu 50 ára føðingardag okkara ógloymandi.

Takk fyri gávur, blómur, fjarrit, telefonsamrøður og øll tit sum komu í føðingardag.

Ein serstøk tøkk til Streingjakórið í K.F.U.M - K., sum vakti okkum við góðum sangi.

Stóra tøkk øll somul, Gud vælsigni tykkum øll.

*Heilsan*

***Tvíburarnir Hilmar og Niels Andreasen***

## 75 ára føðingardagur

4. desember fyllir Judith M. Gudmundsson, Vágur, 75 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini inni á Bakka leygardagin 2. desember.